# Lagt er upp til spennandi dyst í Runavík

**Ein dystur í 1. deild verður leiktur í Runavík í kvøld, har NSÍ fær vitjan av oddaliðnum Skála. Um skálamenn vinna, leggja teir aftur sjógv millum seg og HB, men vinna runavíkingar, eru teir bert tvey stig frá oddasessinum**

NSÍ-SKÁLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Skála hevur tikið øll á bóli í hesum kappingarárinum við at leggja seg á odda í 1. deild og halda seg har. Men í kvøld eru skálamenn á kanska truplastu uppgávuni higartil í ár, tá ið teir skulu yvir um fjørðin og dystast við NSÍ.

### Allir mans tøkir

Dysturin millum NSÍ og Skála skuldi verðið leiktur sunnudagin, men av tí at runavíkingar leiktu Inter-Toto dyst móti Esbjerg leygardagin, bleiv dysturin útsettur til í kvøld. Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ, sigur, at heimaliðið hevur alt fólkið tøkt til dystin, og hann heldur ikki, at tað er nakar vansi fyri runavíkingar, at teir leiktu ein krevjandi dyst leygardagin, tí at tað eru longu fýra dagar síðani, so tann dysturin skuldi ikki sitið í beinunum á spælarunum hjá NSÍ, heldur Jógvan Martin Olsen.

Skálamenn hava eins og runavíkingar alt fólkið tøkt til dystin móti NSÍ, hóast onkrir spælarar hava havt onkrar smærri snuddir at dragast við í seinastuni. Johan Nielsen, venjari hjá Skála, sigur, at dysturin í Runavík er ein torførur dystur, eins og allir aðrir, men teir fara á vøllin fyri at vinna dystin. Skálavenjarin heldur, at NSÍ hevur eitt gott lið, og somuleiðis hava runavíkingar tørv á stigunum. Eins og Jógvan Martin Olsen, er Johan Nielsen av teirri áskoðan, at tað ikki er til fyrimuns fyri nakran, at NSI leikti krevjandi dyst móti Esbjerg fyri fýra døgum síðani.

Verður hugt eftir hagtølunum, so benda tey á ein sigur til NSÍ. Tær báðar undanfarnu ferðirnar í fjør og fyrraárið, at liðini hava hitst til dyst í 1. deild í Runavík, er tað heimaliðið, ið hevur verið við yvirlutan. NSÍ hevur vunnið hesar báðar dystir ávíkavist 3-1 og 2-0. Dysturin í Runavík í kvøld byrjar klokkan 19, og dómari verður Páll Augustinussen.




*Spennandi verður at síggja, um Alexandar Jovevic og NSÍ fara at megna at koppa oddaliðnum Skála, tá ið liðini hittast í Runavík í kvøld*
*Savnsmynd*

# Rooney er kongurin

**Nú er eingin ivi longur um, at enskir fótbóltsfjepparar hava fingið sær ein nýggjan kong, og at kongurin er 18 ára gamli Wayne Rooney, sum mánakvøldið skeyt Ongland í fjórðingsfinaluna í EM-endaspælinum**

BÓLKUR B
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Enska landsliðið spældi seg við einum 4-2 sigri á Kroatia mánakvøldið í fjórðingsfinaluna í EM-endaspælinum í Portugal. Stóri leikarin í dystinum var uttan iva 18 ára gamli framherjin hjá Onglandi, Wayne Rooney, ið veruliga hevur fingið sítt gjøgnumbrot undir EM-endaspælinum. Mánakvøldið skeyt Rooney tvey av ensku málunum, og harafturat legði hann upp til eitt afturat.

### Kroatar góvu eingilskmonnum ein hvøkk

Eingilskmenn fingu annars sum váttan vøttin frammaná, tí longu tá ið fimm minuttir vóru leiktir av dystinum, løgdu kroatar seg á odda. Ein bóltur var sendur innfyri, og í fyrstu atløgu hálvbjargaði David James í enska málinum hegnisliga, men Nico Kovac var fyrstur á returinum, og so var 1-0 til Kroatia.

Tað var tó fyri tað mesta Ongland, ið stýrdi spælinum, og álopini á kroatiska málið vóru nógv, hóast tað ikki so ofta endaði í veruligum málmøguleikum. Men tá ið fimm minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki, bragdaði endiliga hjá onglendingum. Wayne Rooney skallað bóltin upp á tvørs til Paul Scholes, og so kundi Manchester United leikarin við høvdinum skorað á enska landsliðnum fyri fyrstu í meiri enn trý ár. Áðrenn farið var til hálvleiks, eydnaðist tað eisini enska liðnum at leggja seg á odda, tá ið Wayne Rooney royndi seg við einum skoti nakað uttan fyri kroatiska brotsteigin. Bólturin fór umvegis hondina á kroatiska málverjanum, Butina, og í netið, og so var 2-1. Helst átti kroatiski málverjin at tikið skotið.

### Uppiborin sigur

Í seinna hálvleiki vóru kroatar noyddir at satsa eitt sindur meiri fram eftir vøllinum, og tað gav onglendingum betri pláss í kroatisku verjuni. Wayne Rooney var enn einaferð upp á spæl, og eftir hegnisligt samanspæl við Michael Owen legði hann Ongland 3-1, og harvið við avgerðin meira ella minni fallin, tí kroatar skuldu vinna, um teir ætlaðu sær í fjórðingsfinaluna. Einar 20 minuttir fyri leiklok fingu kroatar tó eina lítla vón, tá ið Igor Tudor skallaði bóltin í mál til 3-2, men tað gingu tó einans nakrir fáir minuttir, so svaraði Ongland aftur. Frank Lampard fekk nógv pláss at reka í kroatisku verjuni, og tá ið Chelsea-miðvallarin slapp til skot, sendi hann bóltin framvið Butina í kroatiska málinum til 4-2, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið. Ein uppiborin sigur til Ongland, sum í fjórðingsfinaluni skal dystast við EM-vertirnar úr Portugal.

### Henry søkti Sveits

Hin dysturin í bólki B mánakvøldið var millum Frakland og Sveits. Við einum javnleiki var Frakland tryggjað sess í fjórðingsfinaluni, og tað sá eisini leingi út til, at dysturin fór at enda javnur, men Thierry Henry vildi tað øðrvísi.

Zinedine Zidane legði europameistararnar á odda, tá ið hann skallaði bóltin í mál eftir eitt hornaspark í 20 minutti, men einans seks minuttir seinni skrivaði sveitsiski landsliðsleikarin, Johan Vonlanthen, seg í søgubøkurnar sum tann yngsti málskjúttin í einum EM-endaspæli nakrantíð, tá ið hann javnaði til 1-1. Vonlanthen tók harvið metið frá Wayne Rooney, ið setti tað, tá ið hann skoraði móti júst Sveits í farnu viku.

Fraklendingar vóru við yvirlutan tað mesta av dystinum, men teir noyddust at bíða rættuliga leingi, áðrenn Thierry Henry avgjørdi dystin við tveimum málum til endaliga úrslitið 3-1 til Frakland.

Við sigrinum á Sveits tryggjaði Frakland sær fyrstaplássið í bólki B, og fraklendingar skulu tí dystast við grikkar í fjórðingsfinaluni, meðan onglendingar, sum áðurnevnt, skulu dystast við Portugal.

**Ongland-Kroatia 4-2 (2-1)**
0-1 Nico Kovac
1-1 Paul Scholes
2-1 Wayne Rooney
3-1 Wayne Rooney
3-2 Igor Tudor
4-2 Frank Lampard

**Frakland-Sveits 3-1 (1-1)**
1-0 Zinedine Zidane
1-1 Johan Vonlanthen
2-1 Thierry Henry
3-1 Thierry Henry

## EM-endaspælið í fótbólti

**Bólkur A**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 3 | 2 - 0 - 1 | 4 | 2 | 2 | 6 |
| 2 Grikkaland | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 3 Spania | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 Russland | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 4 | -2 | 3 |

**Bólkur B**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 3 | 2 - 1 - 0 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 2 Ongland | 3 | 2 - 0 - 1 | 8 | 4 | 4 | 6 |
| 3 Kroatia | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 6 | -2 | 2 |
| 4 Sveis | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 6 | -5 | 1 |

**Bólkur C**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | 9 +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 2 | 1 - 1 - 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 2 Danmark | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 0 | 2 | 4 |
| 3 Italia | 2 | 0 - 2 - 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 4 Bulgaria | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 7 | -7 | 0 |

**Bólkur D**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kekkia | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 2 Týskland | 2 | 0 - 2 - 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 3 Holland | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 4 Letland | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |




## Búskaparfrøðingur

Landsbankin søkir eftir búskaparfrøðingi.

**Arbeiðsuppgávur:**
Skriva frágreiðingar um føroyskan búskap og fíggjarviðurskifti. Annars at arbeiða við øðrum slagi av kunning, ma. umvegis heimasíðu landsbankans.

Aðrar uppgávur snúgva seg um, at arbeiða við búskaparmyndli og at arbeiða við at menna føroyska kredit- og kapitalmarknaðin.

Arbeiðið er býtt í ábyrgdarøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki:**
Umsøkjarar skulu hava kandidatprógv í búskaparfrøði ella aðra líknandi útbúgving.

**Løn:**
Eftir avtalu við støði í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Tíðarfreist o.a.:**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar á tlf. 318305.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og størv sendast landsbankanum áðrenn 02.08.2004 kl 16:

Landsbanki Føroya
Governmental Bank

Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo*





www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


### Heimarøktin í Norðoyggjum

## Deildarleiðarar

Søkt verður eftir leiðara til Sambýlið á Heygnum og Sambýlið í Bøgøtu, at byrja 1. august ella eftir avtalu.

Sambýlið á Heygnum er nýtt og opnaði í apríl 2003 og hevur 16 búpláss meðan Sambýlið í Bøgøtu opnaði í 1998 og hevur 10 búpláss. Búfólkini í báðum sambýlunum hava tørv fyriumsorgan, røkt og støðugari hjáveru.

Sum leiðari hevur tú ábrygdina av at tað einkulta búfólki fær eitt trygt og gott lív. Harumframt skal leiðarin, saman við starvsfólkunum og búfólkunum, skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka búfólkinum.
Leiðarin skal standa fyri tí fakligu og fyrisitingarligu ábyrgdini av heiminum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og at skaffa sær vitan innan eldraøki. Hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Søkt verður eftir Sjúkrarøktarfrøðingi ella einum fólki við breiðari heilsufakligari útbúgving og helst við leiðsluroyndum.

Starvið í Sambýlinum á Heygnum er eitt fulltíðarstarv og á Sambýlinum í Bøgøtu er eitt 1/2 tíðarstarv sum kann kombinerast við annað arbeiði í Heimarøktini.

**Náttarvakt**
Tænastan er nýggj og verður skipað í mun til tørvin í økinum. Tænastan skal veitast til fólk, sum búgva heima og/ella inni á stovni. Í Norðoyggjum hava vit hesar stovnar: Norðoya Røktarheim, Sambýlið í Bøgøtu og Sambýlið á Heygnum.

**Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum og/ella heilsurøktarum sum:**
- hava hug og hegni til at verða við í einari skipan, sum er í menning og broyting
- sum ynskja at brúka teirra útbúgving og førleika best møguligt
- hava royndir í at arbeiða sjálvstøðugt og helst innan fyri tað primera økið
- evna at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- duga at samskifta
- góð samstarvsevnir og vera før fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum

**Vit bjóða:**
- eitt nýtt starv við møguleika fyri at skipa og menna starvsinnihald
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum sjúkrarøktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi
- eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt arbeiði

**Setanar og lønarviðurskifti:**
Talan er um starv við setanarstað í Heimarøktini og við ábyrgd mótvegis økisleiðaranum.

Áhugað kunnu venda sær til økisleiðsluna tlf. 457243.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn við neyðugum prógvum skal stílast til:

**Heimarøktin í Norðoyggjum**
Bøgøta 34 · 700 Klaksvík

**Umsóknarfreist 8. juli 2004.**


